Telefonverkið útbyggjast til frama fyri oljuvinnuna

– Landsstýrið fer at seta tekniska eftirlitsnevnd, ið skal fylgja við útbyggingini av Telefonverkinum. Í ár hevur stovnurin bílagt nýggja MTX fartelefonstøð, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður

Íløguætlanin hjá Telefonverkinum er 126 mió krónur yvir fimm ára skeið. Peningurin er oyramerktur á tann hátt, at bert ávís upphædd kann nýtast fyri hvørt árið.

Á hvørjum ári í juli mánaði skal leiðslan á Telefonverkinum tí senda landsstýrinum íløguætlanina.

Tað hevur stovnurin eisini gjørt í ár, men trupulleikin er, at Telefonverkið hevur brúk fyri størri upphædd í ár, enn íløguætlanin loyvir.

Orsøkin er, at stovnurin hevur umbiðið sær eina MTX fartelefonstøð, sum er nýtt samskiftisnet.

Kostar ov nógv at bróta avtaluna

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, hevur telefonmál um hendi. Hann sigur við Sosialin, at meirútreiðslan hjá Telefonverkinum í ár stóðst av, at tað fór at vera bíligari at fáa tólið heim, enn at avlýsa umbiðingina.

- Tí hevur landsstýrið játtað, at meirútreiðslan í ár, verður tikin av játtanini í 1996 soleiðis, at játtanin næsta ár minkar við somu upphædd, sigur Sámal Petur í Grund.

- Hevði tað ikki verið skilabetri at bíða við at gera nýggjar íløgur, til peningurin var tøkur?

- Orsøkin til útbyggingina er, at Føroyar eru ibundnar Cantat kaðalin, sum er tikin í land í Tjørnuvík. Skulu vit fáa nyttu av teimum møguleikum, sum eru í honum, er neyðugt at útbyggja telefonnetið.

- Sum nú er, kunnu telefonfelagar í Føroyum røkka um allan knøttin. Hví hevur tað so stóran skund at útbyggja telefonnetið?

- Útbyggingin er neyðugt fyri at nøkta tørvin hjá framtíðar oljuvinnuni. Ikki bert telefonsambandið, men eisini alt teldusamskiftið gongur um Telefonverkið. Hesi viðurskifti mugu verða í lagi, tá brúk verður fyri tí, sigur Sámal Petur í Grund.

Tekniskt eftirlit við útbyggingini

Er nøkur kanning gjørd sum vísir, um telefonfelagar hava brúk fyri útbyggingini. Tað eru kortini teir sum fyribils skulu gjalda?

- Tað eru ikki aðrar inntøkur. Tó skal sigast, at ein teknisk eftirlitsnevnd verður sett í næstum, sum skal hava eftirlit við teknisku útbyggingini á telefonverkinum, sigur Sámal Petur í Grund, og vísir á reglugerð frá 18. februar 1987.

Samsvarandi grein fimm í reglugerðini, skal landsstýrið velja tríggjar limir í nevndina, men tað er ongantíð gjørt.

Nú verður málið tikið uppaftur. Ætlanin er at fólk við tekniskum, samfelagsligum og fíggjarligum kunnleika skulu sita í eftirlitsnevndini, sum fær til uppgávu at fylgja við útbyggingini á Telefonverkinum. Nevndin verður vald fyrsta dagin, sigur Sámal Petur í Grund.

Dagny

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður: Skulu vit fáa gagn av møguleikunum, sum Cantat kaðalin gevur, er útbygging neyðug

---

Gólvteppi úr føroyskari ull

Tógvvirkið Atlantic Wool hevur gjørt royndir við føroyskari ull, fyri at kanna møguleikarnar at nýta tann grova partin av tógvinum, sum ikki kann nýtast til vanligar bundnavørur. Framtaksgrunnurin stuðlar tiltakinum

Nógv hevur verið gjørt burtur úr at fáa fólk at nýta føroyskt tógv seinastu árini. M.a. hava bindikappingar verið skipaðar, sum hava víst, hvussu nógvir og fjølbroyttir møguleikar føroyskt tógv gevur. Nú verður royndir gjørdar til tess at gagnnýta tann grovara partin av ullini, sum kann nýtast til m.a. gólvteppi

Tað verður nógv tosað um, at vit einki gera við føroysku ullini.

Tað ætlar Álvur Joensen, stjóri á Atlantic Wool í Norðagøtu, at gera nakað við.

Í gjár játtaði Framtaksgrunnurin virkinum stuðul, sum skal nýtast til at gera ullaroyndir. Endamálið er at fáa greiðu á, hvat skal til fyri at fáa sum mest burtur úr ullini.

Álvur Joensen hevur í nógv ár gjørt royndir við ull. Hann sigur við Sosialin, at størsti parturin av tí, sum vit kalla føroyskt tógv, er gjørt úr útlendskari ull.

Royndir at maskinnappa føroyska ull

- Føroyska ullin er so grov, at um tú vilt hava gott tógv burtur úr, noyðist tú at nappa ullina við hond. Tað ber sjálvandi ikki til, um vit skulu hóptframleiða vøru, sigur Álvur Joensen.

Stuðulin úr Framtaksgrunninum skal nýtast at gera royndir við at maskinnappa føroyska ull í Bretlandi. Slíkar maskinur eru bert fáar staðni í heiminum, og tí er ætlanin, um royndir eydnast, fyribils at fáa ullina maskinnappaða í Bretlandi.

Royndirnar higartil hava víst, at vanligt nappað tógv bert fæst úr einum triðingi av ullini. Hetta er tann parturin, sum verður nýttur til troyggjur o.o. pløgg, meðan hin parturin av ullini kann nýtast til gólvteppi, sofateppi og møguliga til vevtógv.

Atlantic Wool hevur gjørt royndir við at tilevna gólvteppi úr føroyskari ull, og tað hevur eydnast væl.

Ikki somu mistøkini sum í áttatiárunum

Loysir tað seg at flyta ullina til Bretlands, fyri síðani at flyta hana aftur til Føroya at framleiða vørur burtur úr?

- Vit ætla nú ikki at gera sum í 80'árunum, tá menn keyptu maskinur í mió krónaupphæddum, fyri síðani at finna út av, at tað ikki bar til kortini.

- Tí verður fyribils farið undir at gera hesar royndir, fyri at vita, hvussu vit kunnu fáa sum mest burtur úr føroysku ullini. Skal tað gerast lønandi vinna, er neyðugt, at øll ullin verður arbeidd, og ikki bert ein partur av henni, sum hjá okkum er ein triðingur av ullini, sigur Álvur Joensen.

Fyribils verða ikki fleiri arbeiðspláss í Norðagøtu, men um royndirnar í Bretlandi eydnast, eru møguleikar fyri at fáa fleiri arbeiðspláss, sigur Álvur Joensen.

Atlantic Wool fer aftur í ár eins og í fjør, at ferðast kring landið at keypa ull. Hetta verður gjørt, tá fjøllini eru gingin.

Dagny

DANNY TRANSPORT

– tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 19192